**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag
Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2009?
Send eina grein til post@sosialurin.fo
Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli



TÍÐARGREININ
*Óli M. Lassen*

# Fíggjarkreppan í 1857

Tá politikara vóru menn og tordu at handla. Árið er 1857, tá ein fíggjarkreppa eisini rakti heimsbúskapin. Spurningurin er, um vit í Føroyum ikki hava politikarar, ið eru longur til høgru enn sjálvt Margaret Thatcher. Sjálvt fyri 150 árum síðani megnaðu politikararnir at handla skjótari enn í dag

Longu í 1857 kunnu vit lesa um eina fíggjarkreppu í USA. Tað var tann 24 august 1857, tá tær fyrstu “Nordamerikanske Fristaters kreditinstitutioner” fóru á húsagang. Longu fýra mánaðir eftir rakti fíggjarkreppan Danmark – so hetta við alheimsfíggjarkreppum ikki eitt nýtt fyribrigdi. Kontórsjefurin í danska Nationalbankanum, E. Meyer skrivaði eina grein um kreppuna. Hetta var tá Danmark var eitt landbúnaðarsamfelag.

“Netop når i den gode tid produktion og omsætning har blomstret, og spekulation har taget kraftigt fat, når formuerne er voksede med virkelige eller indbildte beløb, og forbruget er fulgt med væksten, når kreditten har været alt for villig, kan der indtræde det øjeblik, da alt tilsyneladende vender sig om til sin direkte modsætning – den travle virksomhed standser, priserne falder; der tabes penge, folk, der antoges for at være rige, kan ikke engang tilfredsstille deres kreditorer, forbruget tager af, og kreditgiverne trækker sig forskrækkede tilbage”

Omanfyristandandi sitat minnir sera nógv um kreppuna, vit hava nú. Víðari verður víst á, at tá var ein stór ónøgd við vaksandi arbeiðsloysið, og at stjórnin bíðaði ov leingi við at veita hjálp. Men her er vert at leggja til merkis, at kreppan breyt út í Danmark 1. desember 1857, og longu 18. desember hevði Ríkisdagurin samtykt ein kreppupakka. Stjórnin samtykti eisini at seta á stovn “Den midlertidige Lånekasse for Kongeriget” Lánini vóru latin til handilsmenn, húsaeigara til “spare- og diskontokasser” og til kommunur. Danski staturin hevði ikki tøkan pening til endamálið, men hevði staturin vekslar, sum teir lógu inni við frá Oyrasundstollinum, og blivu hesir effektiviseraðir við útgjaldið frá Privatbankanum við C.F. Tietgen. Longu í januar kundi útgjald latast úr “Den midlertidige Lånekasse for Kongeriget”. Víðari verður sagt at “Den midlertidige Lånekasse for Kongeriget” hevði sera fá tap av sínum útlánsvirksemi.

Skrivstovustjórin skrivar víðari “vi lærte dog noget: Krisen føltes, mens den varede, som ulykkens og uhyggens tid og man var længe om at forvinde dens eftervirkninger. Men foruden ulykkerne bragte den også adskilligt godt. Den fejede meget usundt ud af forretningslivet; den lærte befolkningen i højere grad at sætte tæring efter næring, og frem for alt virkede den til grundigt at reformere vore kreditforhold”

Hetta vísir, at fyri meira enn 150 árum síðani kundi man uttan teldur, telefonir og internet handla munandi skjótar enn man ger í dag. Meðan eg siti og skrivi hesa grein, er danska stjórnin vaknað og ætlar at gera ein “hjálpipakka” til útflutningsfyritøkurnar, tí hesar hava mest sum einki gjaldførið eftir. Longu í mai fóru 11 lond innan ES at veita beinleiðis stuðul til vinnufyritøkur. ES broytti reglurnar soleiðis, at loyvt varð at geva einstøku fyritøkuni upp til 3,7 mió kr í stuðli. Týskland vil brúka heilar 15 mia kr., Ongland 7,5 mia kr., Portugal 5,5 mia kr., Frakland, Eysturríki, Írland, Holland, Slovakia, Ungarn, Lettland og Luksemborg vilja eisini lata vinnufyritøkum stuðul.

Innan ES verður eisini latin nógvur stuðul til fiskivinnuna. Samlaði árligi stuðulin til fiskiflotan er áleið 7,5 milliardir danskar krónur. Her er talan um upphøggingarstuðul og stuðul til nýmótansgerð. Innan ES er tað Spania, ið fær mest í stuðli, men er Danmark eisini væl við, og fáa danskir reiðarar fleiri hundrað milliónir í stuðli um árið. Samstundis verða veittar 400 mia í stuðli innan landbúnaðin í ES, og fær Danmark 9 mia kr. av hesum pengum.

Grundin, til at lond veita kreppuhjálp til vinnufyritøkur, er, tí at politikara vita, at sjálvt sunnar vinnufyritøkur ikki fáa neyðugt gjaldføri til sjálvt rakstur, og tí er hetta ein orsøk til at stjórnir í dag fara inn og veita kreppuhjálp. Nevnliga fyri at arbeiðsloysið ikki skal hækka. Og hetta gerst við at geva vinnufyritøkum rakstrarfígging.

Spurningurin er so, hví føroyskir politikara halda at vit hava ein búskap og eina kreppu, har okkara vinnulív og framleiðsluvirkir kunnu liva uttan kreppuhjálp, tá allur vesturheimurinj fær kreppuhjálp.




Tíðargreinin

# Latið nú kommunurnar fáa frið!

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri í Tórshavnar kommunu



Ferð eftir ferð hava kommunurnar verið noyddar at tikið um endan, so samfelagið ikki steðgaði upp, men tað verður ikki við góða viljanum hjá kommununum, at landsstýrið enn eina ferð sleppur at loysa sínar sjálvskaptu fíggjartrupulleikar við kommunalum pengum, men lat meg sláa fast, at tað slettis ikki verður úr kassanum hjá Tórshavnar kommunu.

Ár undan ári hava vit upplivað, at landsstýri og løgting hava álagt kommunum eykauppgávur ella tikið landsstudning til felags rakstrarmál burtur – og ofta hevur hetta verið aftaná, at kommunurnar longu hava samtykt sínar fíggjarætlanir og ásett lógarkravda skattaprosentið.

Hetta er blivið meira reglan enn undantakið, og tí er tað enntá komið so langt, at kommunurnar hava biðið landsstýrismannin í kommunumálum um verju ímóti hesum óskipaðu og serstakliga óhepnu inntrivum í kommunukassarnar!

Nú er so aftur upp á tal at gera fleiri inntriv í tann rakstrarpening, sum kommunurnar skulu klára seg við, og tí er nú neyðugt at tala at. Hetta gongur ikki, tí kommunurnar hava ikki møguleika fyri at fáa aðrar inntøkur. Tí ber heldur ikki til, at kommunurnar enn eina ferð skulu taka um endan.

Tað hava vit gjørt í ólukkumát, tí landsstýri og løgting ikki hava megnað tað, ið skal til fyri at halda samfelagnum gangandi. Hetta kostar og drenar kommunukassarnar, ið altso ikki standa til at bresta í hesum døgum, men eru minst líka sperdir sum landskassin – vísa tølini frá Fíggjarmálaráðnum…

Besta dømið um, at kommunurnar hava bjargað landinum úr neyðstøðu, var tá vinnan noyddist at rópa neyðarróp til land og kommunur um at loysa barnaansingartrupulleikan, so arbeiðsfør fólk kundu sleppa í vinnu, kommunurnar tóku áheitanina í fullum álvara og loystu barnaansingartrupulleikarnar til fulnar.

Hinvegin megnaði landið ikki at gera sín part, sum var at skula loysa eldraansingartrupulleikan. Nú kemur so rokningin, og kommunurnar noyðast at byggja ellis- og røktarheim við avmarkaðum stuðli frá landinum, ið samstundis setir órímilig, himmalhøg og dýrkandi krøv til bygg-ingina.

Tað er rætt, at kommunalu inntøkurnar og útreiðslurnar farnu 20 árini eru vaksnar, men tað skyldast uppgávur og skyldur, landið hevur álagt kommununum í sambandi við eitt nú barnaansing, barnavernd, eldrarøkt, skúla, heilsu- og umhvørviskrøv til drykkjuvatn, kloakkir, burturkast o.a.

At kommunurnar hava tikið ein alsamt størri part av persónsskattinum, sigur seg tí sjálvt, tí har eru ikki aðrir inntøkumøguleikar enn skatturin, bæði frá persónum og feløgum.

Men um landið nú tekur partafelagsskatt frá kommununum heldur enn at hækka tann partin hjá kommunum frá 38% til 55%, sum er meira í samsvari við verandi uppgávubýti, tekur landið grundarlagið undan fólkastýrinum!

Heldur enn at finna nýggjar slangur fram at stinga niður í kommmunukassarnar, eiga bæði land og kommunur at koma ásamt um, hvussu framburður og trivnaður kunnu skapast, uttan at fólk og fyritøkur verða køvd í skatti, so allur arbeiðs- og virkishugur endaliga verður fyribeindur.

Fyri tað um landið tveitir uppgávur yvir á kommunurnar, uttan at fíggingin fylgir við, hjálpir tað einki, tí fíggingartrupulleikin hvørvur ikki av teirri orsøk. Tað hevði verið nógv erligari og sømuligari, um landsstýri og løgting valdu at samstarva við kommunurnar, heldur enn bara at dyrgja eftir nøkrum kommunalum krónum her og nøkrum har!

**E.S.** Landsstýrismanninum í fíggjarmálum kann eg eisini heilsa, at kunnandi fundurin um sokallaða kreppupakkan ikki kom eftir innbjóðing frá landsstýrismanninum, men var fingin í lag eftir kravi frá kommununum. Endamálið var, at kommunurnar skuldu takast við upp í arbeiðið, men enn røkist einki fyri tí.